# Europeiski dreymuri

**Hann hevur sitið við stýrisvølin í tí mest turbulenta tíðarskeiðnum í nýggjari føroyskari søgu, tá hann sum løgmaður stýrdi landinum gjøgnum ringastu brotasjógvarnar miðskeiðis í nítiárunum. Tey flestu hildu, at hann var fortíð, og at tíðin var komin at leggja árarnar inn. Men púra óvæntað gjørdist hann sigursharrin á fólkatingsvalinum fyri góðum ári síðani. Nú berjist hann fyri at vinna Føroyum eitt pláss í Europasamveldinum. Vit tekna eitt politiskt portrett av manninum, sum hevur verið við til at mynda føroyskan politikk tey seinastu tjúgu árini**



Sosialurin

## Politiskt portrett



**Stefan í Skorini**
stefan_skorini@hotmail.com

Vit eru í 1990. Føroyska samfelagið stendur á gravarbakkanum, men tey fæstu munnu hava nakra hilling á, hvussu illa tað í veruleikanum stendur til. Eftir øllum sólarmerkjum at døma standa føroyingar framman fyri einum døprum tíðarskeiði.

Komandi árini taka allir formenninir í teimum stóru flokkunum seg úr føroyskum politikki. Tann fyrsti er Pauli Ellefsen, formaður Sambandsfloksins síðan 1974. Sambandsflokkurin skal tí velja nýggjan formann at leiða flokkin.

Púra óvæntað fellur valið á tann óroynda Edmund Joensen av Oyri. Edmund hevði tá bert sitið tvey ár á tingi, men hevði royndir úr kommunalpolitikki í sjeytiárunum. Hann var fyrst og fremst kendur sum vinnulívsmaður, ið hegnisliga hevði ment skelja- og rækjuvirkið á Oyri. Hann er tó als ikki tann, sum natúrliga stendur fremst í røðini í Sambandsflokkinum.

Eg royndi at bera meg undan, tá formaðurin á tingi, Agnar Nielsen, vegna ein samdan tingbólk heitti á meg um at gerast floksformaður. Eg helt meg hava ov fáar royndir úr landspolitikki og hevði als ikki droymt um at fáa hendan møguleikan so skjótt. Ambitiónin eftir fyrsta valið í 1988 var at vera tann loyali tingmaðurin, sigur Edmund Joensen.

Eftir at hava vent tingunum heima við hús valdi Edmund Joensen tó at taka við møguleikanum, og brádliga stóð hann á odda fyri tingbólkinum, har fleiri høvdu munandi fleiri politiskar royndir enn hann sjálvur.

### Ósemjur um fiskivinnupolitikk

Fleiri stóðu spyrjandi, tá Edmund Joensen gjørdist formaður í Sambandsflokkinum, tí hann var eitt nýtt andlit í flokkinum. Tvinnar orsøkir vóru tó til, at Edmund bleiv kosin formaður.

Fyrra orsøkin var, at Edmund umboðaði eina endurnýgging av Sambandsflokkinum í einum tíðarskeiði, tá fólkið hevði mist álit á fleiri av teimum royndu politikarunum.

Hin orsøkin skuldi finnast innanfloks. Stórar ósemjur høvdu verið í Sambandsflokkinum um fiskivinnupolitikkin. Serliga var tað spurningurin um ráfiskabýtið, sum elvdi til trupulleikar. Formaðurin Pauli Ellefsen og ein stórur partur av tingmanningini var fyri at býta ráfiskin kring landið, meðan sterki maðurin í Eysturoynni, Jógvan Ingvard Olsen, var harðliga ímóti. Eisini var tað spurningurin um frítt fiskarí kontra avmarkingar, sum setti kílar í tingbólkin.

Hetta elvdi til tvídrátt innanfloks, men gav samstundis Edmundi Joensen møguleikan at røkka politisku tindunum. Edmund hevði ta áskoðan, at fiskaríið undir Føroyum skuldi avmarkast eftir fiskifrøðiligum leisti. Hann hevði sum vinnulívsmaður havt tætt samstarv við Fiskirannsóknarstovuna.

Edmund lá tættari at linjuni hjá táverandi formanni í hesum spurningunum, og tað var møguliga orsøkin til, at tingbólkurin valdi at stuðla Edmundi heldur enn onkrum øðrum meira uppløgdum kandidati.

### »Upptøkulandsstýrið« frá 1994

Eftir fýra ár í andstøðu, meðan búskaparliga ódnin herjaði kring landið, var tíðin aftur búgvin hjá Sambandsflokkinum at taka við landsins leiðslu.

Eftir valið í 1994 var eingin av teimum tungu dreingjunum, ið høvdu myndað føroyskan politikk í sjeyti- og áttatiárunum, at síggja á politiska leikpallinum longur. Sambandshøvdingurin, Pauli Ellefsen, tók seg aftur í 1990, og Jógvan Sundstein valdi ikki at stilla uppaftur til valið fýra ár seinni, tá Atli Dam, sáli, fekk durafjórðingin frá veljarunum.

Vit høvdu serstakliga góðar veljarakanningar uppundir valið í 1994, og tí væntaðu vit at fáa eitt gott val. Tíðin fyrst í hálvfemsunum var eyðkend av, at vit høvdu eingi alternativ. Politikkurin hjá landsstýrinum var diktat frá dønum. Tingið kundi ikki annað enn samtykkja, sigur Edmund Joensen.

Hetta var ein biltingartíð í føroyskum politikki, tí nógvir nýggir flokkar stillaðu upp. Politiska landslagið gjørdist tí meira litfagurt og samstundis torførari at navigera ígjøgnum. Fólk vóru troytt av sitandi landsstýri, og tí fekk Sambandsflokkurin eina dygga álitisváttan á hesum valinum.

Landsstýrið frá 1994 var eitt upptøkulandsstýri. Nógv grundleggjandi lógarkompleks skuldu skiftast út, og tað var neyðugt at gera nýggjar skipanir á nógvum týðandi økjum, sigur Edmund Joensen.

Hetta var sum at fara ígjøgnum eina turkimaskinu. Alt samfelagið skuldi umstillast, og tað elvdi sjálvsagt til politiskan turbulens, men eingin hevði droymt um, at landið fór at koma so skjótt á føtur aftur, hugleiðir Edmund Joensen um tíðarskeiðið sum løgmaður.

Politiski turbulensurin kom eitt nú til sjóndar, tá Jóannes Eidesgaard og Javnaðarflokkurin tóku seg úr samgonguni í 1996. Fólkaflokkurin stóð tó klárur á síðulinjuni, og tí kundi Edmund halda fram sum løgmaður.

Arbeiðsloysið í 1994 var metstórt, og fólk flýggjaðu av landinum í hópatali. Undirskotið á fíggjarlógini var eina hálva milliard krónur, og tí var ikki nóg at geva út av hjá politikarunum. Men tað gekk skjótt framá. Tá Edmund Joensen legði frá sær,